# Vil menna fakliga innihaldið

**Mannliga valevnið til formansvalið í Pedagogfelagnum heldur, at fakliga innihaldið hjá limum felagsins eigur at mennast. Hann stillar ikki uppfyri nakað ávíst øki men fyri alt felagið, sigur Jarvin Hansen**

FORMANSVAL
*Edvard Joensen*



*Jarvin Hansen, leiðari á Sambýlinum á Bóndheygi, stillar upp til formansvalið í Føroya Pedagogfelag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fakliga støðið hjá teimum, sum arbeiða á dagstovnum og búfelagsskapum eigur at mennast. Tað er ikki nokk, at hesi støðini bara skulu vera parkeringspláss til teirra, sum koma ella búgva har. Í dag verður kravt meira enn so av starvsfólkinum, sigur Jarvin Hansen, ið er annar teirra, sum stillar upp til formansvalið í Pedagogfelagnum, sum verður tann 28. februar.

Foreldur og onnur avvarðandi seta størri og størri krøv til teirra, sum arbeiða á støðum, har børn og ung verða ansað. Tað er ikki soleiðis meira, sum fyrr onkuntíð var, at dagella døgnstovnurin er eitt parkeringspláss, har barnið verður latið inn, meðan foreldrini eru til arneiðis ella upptikin av øðrum. Í dag verður kravt nógv meira enn so, og nógv er at hyggja eftir og leggja merki til. Tí krevur tað eisini rættiliga nógv av teimum, sum arbeiða á slíkum støðum, sigur Jarvin Hansen.

– Fyrstu tíðina kendist tað mangan nokk so einsamalt at vera maður í hesum yrkinum, sigur Jarvin Hansen, sum ásannar, at pedagogyrkið mestsum er ein konufólkaverð burturav.

Men sum frá er liðið eru fleiri og fleiri menn komnir afturat. Serliga tá kreppan var, vísti tað seg, at fleiri handverkarar fóru at læra og arbeiða sum pedagogar. So í dag er eingin trupulleiki at fáa handverkarar til bú- og dagstovnar, sigur hann.

Hann metir, at ov lítið av útbúnum fólki er at taka av, og vil tí, um hann verður valdur til formann í Pedagogfelagnum, millum annað virka fyri, at útbúgvingin verður ment.

Eitt annað mál, sum liggur honum á sinni, er at fáa eina lagaliga fráfaringarskipan fyri fólk í yrkinum, sum vegna aldur ynskja at trappa niður, sum hann tekur til.

Eitt nú fólk, sum nærkast pensiónsaldri áttu at fingið høvið til at stytt sær arbeiðstíðina uttan at missa løn av teirri grund. Hetta sum eina samsýning fyri strævið arbeiði. Tí strævið er tað at arbeiða á stovni, har fólk annaðhvørt verða ansað, meðan foreldrini eru til arbeiðis, ella búgva fast.

– Tað er virðiligt at hugsa meira um tey tilkomnu, sigur Jarvin Hansen.

Arbeiðstíðin eigur at verða stytt frá 40 niður í 37 tíma viku, og eingin ivi er um, at fleiri útbúgvin fólk eiga at fáast í fakið. Tað eru alt ov nógv fólk uttan útbúgving, sum arbeiða á stovnum í dag, vísir hann á.

– Tosað verður alla tíðina um at nøkta tørvin á ansing. Men alt ov lítið verður hugsað um innihaldið. Her eigur ein komandi leiðsla í Pedagogfelagnum at brúka rættiliga stóra arbeiðsorku, sigur mannliga valevnið til formanssessin í Føroya Pedagogfelag.

Jarvin Hansen er 34 ára gamal og ættaður úr Klaksvík. Hann arbeiðir í dag á fjórða ári sum leiðari á Sambýlinum á Bóndaheygi í Havn.

Hann byrjaði at arbeiða á Eirargarði í 1990, greiðir hann frá, og hevur síðan arbeitt ymsastaðni. Hevur til dømis verið tvey ár í Danmark, tvey ár á Barnaheiminum, eins og hann eisini hevur arbeitt sum stuðul. Hann fór á pedagogskúla í Havn og fekk prógv haðani í 1997.

Eisini hevur Jarvin Hansen verið í starvsnevndini hjá Javna í trý ár. Og hesum hevur hann lært nógv av, sigur hann.

Um bygnaðin í Pedagogfelagnum sigur Jarvin Hansen, at júst tíðin í Javna hevur givið íblástur til eina umskipan av Pedagogfelagnum, soleiðis at eitt nú økisnevndir verða skipaðar, sum kunnu hava eftirlit við teimum ymsu stovnunum í ymsu økjunum kring landið. Tí ymikst er, hvussu stovnarnir eru fyri fakliga, og ein einsamallur formaður á eini skrivstovu í Havn kann eisini koma í ta støðu, at hann líkasum »missir sambandið« við hesar limirnar, heldur Jarvin Hansen

# Kann altíð gera tingini betri

**Næstformaðurin í Pedagogfelagnum, sum stillar upp til formansvalið á aðalfundi felagsins 28. februar, ætlar at leggja stóran dent á fakfelagsarbeiðið. Hon heldur uppá, at ein altíð kann gera tingini betri**

FORMANSVAL
*Edvard Joensen*



*Ann-Elisabet Joensen hevur verið nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag í trý ár. Tvey teirra sum næstformaður. Nú ætlar hon at gerast formaður í felagnum*

*Mydn: Jens Kristian Vang*

Næstformaðurin í Føroya Pedagogfelag ætlar sær at verða formaður komandi valskeiðið hjá felanum, sum er tvey ár.

Ann-Elisabeth Joensen er ættað úr Fulgafirði. Hon er útbúgvin sosialpedagogur úr Danmark, har hon eisini arbeiddi í fleiri ár, áðrenn hon í 1996 flutti heim aftur til Føroya. Í Danmark arbeiddi hon rættiliga nógv við innflytarafamiljum.

Heim aftur komin til Føroya fór hon fyrst í starv hjá stuðulsskipanini há Tórshavnar Kommunu og tók í 1998 við starvi sum leiðari á frítíðarskúlanum. Hon er í dag leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø, sum er knýttur at Venjingarskúlanum.

Ann-Elisabeth Joensen hevur í trý ár verið nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag og hevur seinastu tvey árini verið næstformaður í felagnum.

Verður hon formaður í Pedagogfelagnum, fer hon at biða um farloyvi fyri at kunna røkja starvið til fulnar.

– Tað kann í dag verða ein forðing, at eg eri stovnsleiðari hjá kommununi, samstundis sum eg skal røkja fakfelagsarbeiðið. Hesi bæði størvini fara fyrr ella seinni at stríða móti hvørjum øðrum, væntar hon.

Ann-Elisabeth Joensen stillar sjálvonnur upp til formansvalið í Pedagogfelagnum, sum verður tann 28. februar. Mótvalevnið er ein maður. Tað er Jarvin Hansen, sum eisini er stovnsleiðari.

– Tað er gott, at fleiri stilla upp, sigur Ann-Elisabeth Joensen. At annað valevnið er mannfólk, ger tað ikki minni spennandi í eini konufólkaverð, sum pedagogfakið í veruleikanum er, sigur hon.

Hon ætlar sær at leggja seg eftir at menna fakið, sum hon tekur til. Heldur, at tað hevði verið eina roynd vert at havt eitt fólk aftur at formanninum í starvi hjá felagnum. Tað kundi so gott verið ein nevndarlimur, ið kundi tikið sær av teimum reint fakligu spurningunum, sum stinga seg upp. Soleiðis, at felagið ikki bara líkist eini stórari umsiting.

Hon heldur seg hava fyrimun av at hava sitið í nevndini í Pedagogfelagnum i trý ár. Og hon gjørdi beinanveg av at stilla upp til formansvalið, tá nevndin heitti á hana, tá tað var greitt, at fráfarandi formaðurin, Carita Bjørklund, ikki stillar uppaftur.

Eisini metir hon tað sum ein fyrimun, at hon hevur rættiliga breiðar starvsroyndir í fakinum. Hon hevur bæði arbeitt við innflytarum í Danmark, arbeitt á vøggustovu, barnagarði, stuðulsskipan.

## Sandoyingar hugna sær

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy skipar fyri tiltøkum hvønn mánadag og mikudag. Í næstu viku er áhugaverd skrá**

TILHALD
*Edvard Joensen*

Sandoyggjafólk fáa høvi at hugna sær seinnapartar mánadag og mikudag. Og í næstu viku er serligt hugnakvøld á skránni.

Mikukvøldið 11. februar skipar Hugni saman við ungmannafelagnum Virkinum fyri hugnakvøldi, sum byrjar við borðhaldi klokkan 19.00. Aftan á veðru farið upp á gólv. Bæði til føroyskan dans og aftur við harmonikuni.

Kostnaðurin fyri hetta kvøldið er 50,- krónur, og boðast má frá luttøku á tlf. 31 19 90 í seinasta lagimánadagin 9. februar.

Vanliga skráin mánadagin verður, at lisið verður úr klassikaranum Lognbrá hjá Heðini Brú, og ein drekkamunnur er eisini at fáa.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Eyðvør Dam, sparikassaleiðari:

## Sparikassin nýggjan deildarleiðara í Sandoy



Sandoy hevur fingið nýggjan sparikassaleiðara. Tann 1. februar tók Eyðvør Dam við sum nýggjur deildarleiðari fyri oynna. Hon tekur við eftir Sverra Mohr Edvinson, ið herfyri tók við nýggjum avbjóðingum í Føroya Sparikassa.

Eyðvør Dam er 41 ára gomul og hevur starvast í Sparikassanum í knappliga 20 ár. Hon byrjaði í Sparikassanum 1. juni 1984. Frammanundan hevði hon verið í skrivstovulæru hjá byggifelagnum Danberg & Sørensen í Havn. Hon tók sparikassaútbúgving og er eisini farin undir Finansiel Videreuddanelse.

Nýggi deildarleiðarin er ættað úr Skopun, men hon býr í Húsavík. Hon er gift við Eyðfinni Dam.

Eyðvør er eisini virkin uttan fyri arbeiðið. Hon hevur drúgvar royndir frá lokalpolitikki, tí hon var bygdaráðsforkvinna í Húsavík í tvey valskeið í tíðarskeiðinum 1993-2000. Eyðvør er eisini við í einum felagi, ið skipar fyri dansispølum og gamlamannadansi, og so dámar henni eisini væl at fáast við handarbeiði.

Í sambandi við starvssetanina verður móttøka á deild Sparikassans heima á Sandi mikudagin 11. februar kl. 15-17. Móttøkan er almenn, og øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið.

## Smyril Line sett sølu- og marknaðarstjóra

**Leiðslan í Smyril Line hevur sett Niels Kreutzmann, marknaðarstjóra í Bornholms Trafikken, í nýstovnaða starvið sum deildarstjóri fyri øllum ferðafólkavirkseminum hjá felagnum**

TÍÐINDASKRIV



Niels Kreutzmann er 38 ár, útbúgvin cand.merc. og hevur drúgvar royndir innan ferðavinnu. Hann tekur við nýggja starvinum 1. mars

Sølu- og marknaðarstjórin, ið fer til verka í nýstovnaðum starvi í Smyril Line 1. mars, hevur drúgvar royndir innan ferðavinnu.

Niels Kreutzmann, sum er settur í starvið, er 38 ár og hevur síðani august í 2000 verið marknaðarstjóri í Bornholms Trafikken. Hann var marknaðarstjóri í Grønlandsfly í trý ár, har hann starvaðist í tilsamans 13 ár, áðrenn hann fór í starv hjá Bornholms Trafikken. Niels Kreutzmann hevur sitið í ovasta leiðslubólkinum í báðum feløgum og hevur tilsamans sjey ára royndir sum marknaðarstjóri innan skipa- og flogferðslu.

Komandi sølu- og marknaðarstjórin í Smyril Line er útbúgvin cand. merc. í marknaðarføring, strategiskari ráðlegging og ferðavinnubúskapi.

Niels Kreutzmann, sum er uppvaksin í Nuuk, hevur føroyska konu og hevur verið nógv í Føroyum bæði privat og í ferðavinnuhøpi, haðani hann eisini hevur góðan kunnleika um ferðavinnuna í Norðuratlantshavi.

Nevndin í Smyril Line samtykti í november í fjør at søkja eftir einum sølu- og marknaðarstjóra við altjóða royndum og hollari útbúgving á økinum eftir tilmælum í eini eftirmeting av søluni og marknaðarføringini hjá felagnum, sum norðurlendska ráðgevandi fyritøkan, Ementor, og føroyska, Fjølmiðlaráðgevingin, gjørdu.

Bjarni Hammer:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Keypssamtøku



*25 ára starvsdagin fekk Bjarni Hammer t.v. handaða eina kurv við blómum og góðgæti frá leiðaranum í FK í miðbýnum, Bo Møller*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hósdagin 5. februar hevði Bjarni Hammer í Havn 25 ára starvsdag hjá Føroya Keypsamtøku í Dr. Jacobsensgøtu í Havn.

Bjarni er 66 ára gamal og ættaður úr Hovi. Hann sigldi sum ungur og hevur eisini arbeitt í byggivinnuni í Grønlandi.

Seinastu 25 árini hevur Bjarni arbeitt sum bilførari hjá FK í miðbýnum, har hann hevur koyrt vørur út til mong húsarhald í Havn. Hann er álítandi og sera góður at samstarva við, verður sagt frá FK.

Bjarni er giftur við Katrin, sum eisini er úr Hovi, tey eiga tríggjar døtur, Margrethu, Josefinu og Elsu.

### 85 ár

Mánadagin 9. februar fyllir Jákup E. Joensen, í Gerðum Klaksvík, 85 ár.
Dagurin verður hildin hjá Leivur og Áslu Kráargøtu 10 frá kl. 18.00.

### 80 ár

Í morgin, 8. februar, fyllir Símun P. Poulsen, Fuglafirði, 80 ár.

Dagurin verður hildin saman við børnunum og abbabørnunum.

### 60 ár

Mánadagin 9. februar verður Brynhild Djurhuus á Sendistovu Føroya í Keypmannahavn 60 ár.

### Prógv

29. januar hevur Svein Eliasen, Tórshavn, lokið prógvið *Professionsbachelor som pædagog* við Viðborg Seminarium.

20. januar fekk Magni Jacobsen, Tórshavn, prógv sum kokkur á Hotel d'Angleterre, Keypmannahavn.

### Dagurin

**7. februar. Rikard,** deyður umleið ár 720. Enskur kongur, sum gjørdi pílagrímsferð til Róm og Heilaga Landið, men doyði longu á útferðini. Summi halda, at talan er um Rikard Leyvuhjarta, sum doyði í 1199, men hann varð ongantíð skírdur halgimenni.

Germanskt navn, ið merkir mikil, *harður* ella *sterkur*.

**8. februar. Korinta,** deyð umleið ár 250. Kristin kona í Aleksandriu, sum ikki vildi ofra til heidnar gudar og tí varð tikin av døgum.

**9. februar. Appolonia,** deyð umleið ár 250. Ein onnur kona í Aleksandriu, sum fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk tenninar trektar út og varð síðan brend á báli. Verndarhalgimenni hjá tannlæknum.

Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, *hin ljómandi*. Ein søga er um, at Nólsoyar Páll vildi, at ein dóttirin skuldi eita Napoleonia eftir Napoleon keisara, sum hann var so hugtikin av, men prestur vildi ikki doypa hana við tí navninum. Teir samdust tá um at kalla hana Appoloniu.

### Andlát

28. januar
Tummas Weihe, ættaður úr Porkeri, búsitandi í Helsingør, 51 ár

31. januar
Gisli Rasmussen, Tórshavn, 54 ár.
Herborg Christiansen, Kollafjørður, 74 ár.
Olivia Petersen,Vestmanna, 91 ár.

1. februar
Pól Thomsen, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Måloy, 72 ár.

2. februar
Petur Jákup Sivertsen, ættaður frá Gjógv, 73 ár.

4. februar
Arnold Winther, Vágur, 87 ár.